Semingsstovnurin

## Semingsuppskot

Í sáttmálanum dagfestur 8. novembur 2013 millum

**Maskinmeistarafelagið**

og

**Fíggjarmálaráðið**

um maskinmeistarar við Strandfaraskipum Landsins verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður soljóðandi: "Hesin sáttmáli fevnir um maskinmeistarar, motorpassarar og elektrikarar við Strandfaraskipum Landsins (SSL)." Sáttmálin verður rættaður samsvarandi hesum.

2) Í § 2 verður í stk. 3 skrivað §§ 15 og 16 í staðin fyri §§ 13 og 15.

3) Í § 2 verður sett nýtt stk. 5, soljóðandi: "Fastir avloysarar verða settir í fast starv í skipabólki 3 í lønarflokki 2 og lønin verður í hvørjum einstøkum føri regulerað eftir, hvørjum flokki, teir avloysa í."

4) Í § 4 verður reglan, sum byrjar við "Viðm. Annar ..." strikað.

5) Í § 4 verður á rætta stað skrivað: "Elektrikari við víðari útbúgving gongur stigini 4.4 til 5.7."

6) § 5 verður soljóðandi: "Tímalønin verður roknað soleiðis: Ársløn á viðkomandi stigi býtt við 2366.

7) § 6 verður soljóðandi: "Lønin er ásett í lønartalvu galdandi fyri henda sáttmála. Tann 1. oktober 2016 hækkaðu lønirnar 1,9%."

8) Í § 7 verður sett nýtt stk. 4, soljóðandi: "Vaktargjald 1 er 0,062% av mánaðarlønini á stigi 32 (t.e. 7.1). Vaktargjald 2 er tað dupulta."

9) Í § 8 Eftirlønartrygging. Frá 1. oktobur 2016 verður goldið 14,5%.

10) Í § 11 verður 225 broytt til 300.

11) § 14 verður broytt samsvarandi semjuni í Skálavík. Stk. 1 verður soljóðandi: "Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x197,2 tímar (197,2 = 45.5 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri hvørjar tveir mánaðir. Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri." Stk. 2 verður óbroytt. Stk. 3 verður soljóðandi: "Staðbundin avtala kann eisini verða gjørd millum SSL og Maskinmeistarafelagið um, at arbeiðstíðin á einum skipi ella á einari farleið verður broytt. Mánaðarlønin verður tá broytt 1/197,2 fyri hvønn tíma.. Stk. 4 til 7 verða óbroytt.

12) Í § 15, stk. 3 verður eftir orðið meirtímar skoytt uppí: "ella avspákan".

13) Í § 16, stk. 1 verður teksturin: meirarbeiðstími roknaður sum 1,225 tími broytt til "meirarbeiðstími roknaður sum 1,25 tími."

14) Í § 16 verður alt stk. 5 strikað.

15) Í § 19 verða stk. 3 til 7 strikað, og í staðin verður skrivað soleiðis: "Stk. 3. Maskinmeistari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga. Maskinmeistari, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði við løn í 24 vikur tilsamans at rokna frá tí, at kvinnan gerst óarbeiðsfør, tó í fyrsta lagi 8 vikur undan mettum barnsburði. Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Umframt nevndu sømdir kann maskinmeistari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

16) Stk. 4. Ættleiðing. Maskinmeistarar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

17) Stk. 5. Farloyvi við ongari løn. Herumframt hevur maskinmeistari rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans fyri foreldrini eru upp í 52 vikur eftir føðing.

18) § 19, stk. 8 verður broytt til "SSL rindar kravdar læknaváttanir."

19) Í § 21, stk. 2 verður ein arbeiðsdagur broyttur frá at vera 8 tímar til 7,8 tímar.

20) § 22, stk. 2 verður broytt soleiðis, at har tað stendur "7 tímar pr. dag" verður hetta broytt til "7,8 tímar pr. dag".

21) § 23, stk. 6 verður strika.

22) í § 28 verða árstølini 2013 og 2016 broytt til 2016 og 2017.

Sáttmálin verður dagførdur samsvarandi omanfyri standandi.

Tórshavn 13. 01. 2017

Páll Hansen
Maskinmeistarafelagið

Fíggjarmálaráðið

## Protokolat um halgidagssigling

Tímatalið fyri sigling halgidagar verður tað sama fyri maskinmeistarar og navigatørar, alt eftir siglingarleið.

Eru feilir gjørdir í útgjøldum fyri undanfarin ár, síðan nevndu halgidagar komu við í siglingina, verður hetta rættað.

Tórshavn 13. 01. 2017

Maskinmeistarafelagið
Páll Hansen.

Fíggjarmálaráðið